LANDSFUNDUR SJÁLVSTÝRISFLOKSINS

verður í Kappróðrarneystinum á Glyvrum

25. januar 2003

Aðalfundurin verður kl. 10.00

Kl. 13.00 verður politiskt orðaskifti

Aftaná verður døgverði

Øll sjálvstýrisáhugað eru vælkomin

Sjálvstýrisflokkurin

- ger góðar tíðir betri

www.tingakrossur.fo

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2051, Sp/f Vikarstovan Heilsubót, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 12.12.2002.
Strikan av hjánavni: Sp/f Húsarøkt
Nýtt navn: Sp/f Húsarøkt
Nýtt hjánavn: Sp/f Vikarstovan Heilsubót (Sp/f Húsarøkt)
Endamál: Endamál felagsins er at reka handverksvinnu og annað starv í hesum sambandi umframt at reka vikarstovu við setan og ávísing av starvsfólki innan sjúkrarøkt og annað starv í tí sambandi.

Skráseting Føroya tann 9. januar 2003

Kristin Balle

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Almennir bygdarráðsfundir

hjá Sandavágs Bygdarráð 2003

verða á kommunuskrivstovuni hesar hósdagar kl. 19.00.

30. januar
27. februar
27. mars
24. apríl
22. mai
26. juni
28. august
25. september
30. oktober
27. november
18. desember

Yvirlit yvir tey mál, sum koma fyri á fundi, eins og úrrit fyri fundir eru at síggja á heimasíðuni www.sandavagur.fo
Fyrilit verða tikin fyri reglum um tagnarskyldu.

Mál, sum skulu fyri bygdarráðsfund, skulu vera inni 14 dagar áðrenn fund.

SANDAVÁGS KOMMUNA

Pedagogar til Dagstovnin á Oyri

Søkt verður eftir 2 pedagogum til vøggustovuna at byrja 1. mars 2003 ella eftir nærri avtalu. Størvini eru 30 tímar um vikuna, men ynskir tú fleiri/færri tímar er tað eisini møguligt.

Sjúkra/frítíðaravloysara
Somuleiðis søkja vit eftir avloysara til tá onkur er sjúkur ella er í feriu, at byrja skjótast tilber. Tímatalið og arbeiðstíðin er ymisk frá viku til viku.

Dagstovnurin er normeraður til 42 børn, sum eru uppdeild í 3 bólkar:

Vøggustova	15 børn	0-3 ár
Innistova	9 børn	3-4 ár
Stórastova	18 børn	4-7 ár

Vit liggja í náttúruvinarligum umhvørvi við haga og fjøru og leggja stóran dent á at nýta hetta í gerandisdegnum.
Vit ynskja, at tú saman við okkum kann skapa ein ríkan og mennandi gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum.

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum kommunalu arbeiðsgevarafeløgini og Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu verða stovninum í hendi í seinasta lagi 24. januar 2003.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran Rosu Prestá ella varaleiðaran Sólrun Dam, á tlf. 422552.

SUNDA KOMMUNA

Dagrøktastovurin á Oyri
450 Oyri
tlf. 422552 - Fax. 422632

Útbjóðing

Sumbiar skúli – útbygging

Fyri Sumbiar Kommunu verður arbeiðið viðv. Sumbiar Skúla – útbygging, boðið út alment í **høvuðsentreprisa**, arbeiðið fevnir um:

Timburarbeiði
Snikkaraarbeiði
Múraraarbeiði
Málaraarbeiði
Gólvlegging
Lendisarbeiði
Hvs-arbeiði
El-arbeiði

Útbjóðingartilfarið kann verða umbiðið nú og fæst móti kr. 1.000,00 í veð við krossaðum kekki, við at venda sær til teknistovuna hjá Albert Isfeld & Gudmund S. Hansen.

Boð skulu saman við útbjóðingartilfarinum latast inn á teknistovuna hjá **Albert Isfeld & Gudmund S. Hansen**, arkitektar A. F. sp/f, Lucas Debesargøta 11, Tórshavn í afturlatnum brævbjálva merktur:

Sumbiar skúli – útbygging – tilboð

í seinasta lagi fríggjadagin **17. februar 2003 kl. 16.00.**

Boðini verða tá latin upp og kunna teir bjóðandi verða hjástaddir.

Albert Isfeld & Gudmund S. Hansen,
arkitektar A. F. sp/f
Lucas Debesargøta 11
Box 70 · 110 Tórshavn
Tlf. 313696 · Fax 316488

Almennir fundir

hjá Skála Bygdaráð í 2003 verða hesar mikudagar kl. 19.00:

29. januar	27. august
26. februar	24. september
26. mars	29. oktober
30. apríl	26. november
28. maj	17. desember
25. juni	

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu verða kommununi í hendi 14 dagar áðrenn fundin.

Skála Bygdaráð

Reparera bilar
Tryggingarskaðar
Uppræatting og lakering

Alt mekaniskt arbeiði og styling til bilar

Auto-Tek
Argjaboðagøta 5 ·
Tlf. 321206 · Fax 321236
eftir kl. 17.00 á Tlf. 221006

i

<ph_1> ph_1 <ph_1>

Vikuskifti

Nr. 7 • leygardagur • 11. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Tú hittir nógv nýggj fólk

– sigur Hans Kárason Mikkelsen, ið lesur á Harvard

Lesið síðu 8 & 9

Hugleiðingar um ársskiftið

Enn eitt ár er farið. 365 bløð eru tikin út álmanakkanum, og vit standa aftur á gáttini til eitt nýtt ár. Eitt ár, sum eins og øll onnur ár fer at bera okkum ymiskar hendingar, sum vit - hvør í sínum lagi - fara at kenna gleðir og sorgir av

ÁRSSKIFTI
Edvard Joensen

Við eitt árskifti er tað tíð, vit tosa um. Tíðin, sum verður býtt upp í dagar mánaðar og ár. Eitt av hesum árum hava vit nú latið frá okkum og eru farin inn í tað næsta.

Tíð er eitt sveimandi hugtak. Tíðin broytist. Tað eru verri ella betri tíðir, siga vit. Nú er tað og tað uppi í tíðini.

Men hvussu við okkum sjálvum? Eru tað ikki í veruleikanum vit, sum broytast og áseta tað, sum er í tíðini. Tíðin kemur og fer av sær sjálvari. Við somu ferð, og hana kunnu vit ikki gera so nógv við. Hon er tíðin, og hon broytist í grundini ikki, hóast vit vilja siga tað.

Vit vilja, at tað, sum uppi er í tíðini, tað skal lagast eftir okkara hugsan og høvdi.

Nú í tíðini eru tað politikararnir, sum verða viðgjørdir. Teir hava gjørt tað lort. Mestsum alla tíðina. Siga vit.

Og so krevja vit av landsstýrismálanevnd og fjølmiðlum, at nú skulu teir avdúkast og helst forkomast. Tíðum krevja vit tað.

Krossfest! Krossfest! Tað er líkasum, at vit einaferð fyri langari tíð síðan hava hoyrt tað rópið. Men nú halda vit, at tíð er uppá, at tað aftur kemur upp í tíðina.

Men vit gloyma, at tað skal meira til enn so.

Ivaleyst er tíð uppá, at teir fáa at vita, at nú er teirra tíð liðin. Men hvussu vita vit, hvat klokkan er sligin?

Viðhvørt er veruliga skil í teimum skuldsetingum, settar verða fram. Men tíðum eru tær ógrundaðar. Eru líkasum bara fruktir av teirri øsing, sum uppi er í tíðini. Ein aldargomul heksajakt, sum tíðin ikki hevur megnað at doyvt ella lagt burtur.

So gongur tíðin, og vit koma aftur til tað, sum var uppi fyrr í tíðini. Sama øsing, sum við tíðaravmarkaðum millumbilum kemur aftur. Og hesaferð eru tað politikararnir, sum brúka øsingina, sum er uppi í tíðini, til sín fyrimun.

Og so taka vit undir og gloyma, at fyri stuttari tíð síðan var alt øðrvísi. Til vit aftur halda tíð vera uppá, at venda við og hoppa yvir aftur í hin partin, sum ikki heldur, at politikararnir fylgja við tíðini.

Aftur bankar tíðin á dyrnar, og vit standa bíðandi eina løtu. Líkasum slota út í myrkrið, nú fýrverkið er fýst av, bálini eru við at linka, og tað stillir eitt sindur av aftur.

Hvat fer hetta nýggja árið at bjóða okkum? Tora vit at líta á, at tað bara verður gott? Ella skulu vit bara lata standa til og taka tað, sum kemur?

Jú, ymsir eru spurningarnir, og einki hava vit svarið, tá vit skulu vera heilt erlig.

Vit verða noydd at taka tað, sum kemur, og vit kunnu ikki rokna við, at tað bara verður gott. Tað vildi verið rættiliga naivt at hildið tað. Men fyri tað er eingin grund til bara at lata standa til. Tí onkrum fáa vit hóast alt stýrt. Um ikki øðrum so okkum sjálvum so dánt. Og tað eiga vit at royna at gera.

Vit hava nú blaðað enn einaferð í álmanakkanum og standa við einum óskrivaðum blaði í hondini. Og hóast tað er størri og sterkari hond enn okkara, sum førir pennin, kunnu vit kortini við tí, okkum er givið og litið til, gera mun, tá skrivað verður á hetta blaðið.

Latið okkum tí, hvør í sínum lagi, skrivað tað, sum best er fyri okkum, fyri nærumhvørvi okkara, og ikki minst fyri samfelagið alt. Latið okkum í felag taka í móti teimum avbjóðingum, sum koma. Givið er, at tær koma. Men tær eru til at vinna á.